KAUPTHING
Virðisbrævameklarafelag



Vika 32, 2005
www.kaupthing.fo

# Oljuprísur oman fyri 61 dollarar

Oljuprísurin setur alsamt met um dagarnar. Í farnu viku hækkaði prísurin á Brentolju úr 59,7 til 60,6 dollarar fyri tunnuna. Hann var fleiri ferðir oman fyri 61. Orsøkirnar til høga oljuprísin eru tær somu, sum vit so ofta hava skrivað um her: Lítil eyka framleiðslukapasitetur, ódnir í meksikanska flógvanum, verkfall og tílíkt. Eitt, sum kann stuðla undir, at hann hækkar enn meir komandi vikurnar er, at august er tann mánaðin, har amerikanarar nýta nógv mest bensin. Tað minkar vanliga um oljugoymslurnar. Tá tær skulu fyllast upp aftur til veturin, verður stórur tørvur á ráolju. Høgi oljuprísurin hevur ikki enn økt munandi um prísvøksturin, men hann leggur trýst á ídnaðin.

### Lánsbrævarentur hækkaðar

Í summar hava lánsbrævarenturnar sveiggjað eitt sindur, uttan týðiligt rák. Nú er sannlíkt, at tær fara at hækka eitt sindur komandi vikurnar. Amerikanska arbeiðsmarknaðarfrágreiðingin fyri juli mánaða vísti, at 207.000 nýggj starvspláss vóru stovnssett ímóti 180.000 væntaðum. Eisini vóru tølini fyri juni uppmett.

### Vinningsstaðfesting av partabrøvum

Partabrøv á okkara leiðum megna sum heild at hækka, hóast nakrir íleggjarar nýta góðu roknskapirnar til at staðfesta vinning. Av stóru norrønu fyritøkunum sum hava staðið seg serliga væl higartil í ár kunnu serliga Statoil og Mærsk nevnast, við einum vøkstri uppá ávikavíst 54% og 44%. Teliasonera og Assa Abloy hava hinvegin havt eina virðisminking uppá -7% og -8% í sama tíðarskeiði.

### Hesa vikuna

Hetta verður ein áhugaverd vika á fíggjarmarknaðunum. Sum vanligt er tað USA, sum setir kósina, hóast vit eisini fáa BTÚ-tøl úr Evropu. Íleggjarar leita eftir teknum, ið stuðla undir sterku arbeiðsmarknaðarfrágreiðingini. Ovast á breddanum er fundur í tjóðbankanum, umframt tøl fyri smásøluna og handilsjavnan. Hesar hendingar hava allar týdning fyri bæði lánsbrøv, partabrøv og dollarakursin. Hóast partabrævaíleggjarar staðfesta vinning, er einki sum bendir á, at jaliga rákið ikki skal halda á fram.

**Donsk 10-ára renta**




**Vísital fyri norrøn partabrøv**




**Gjaldoyru**

| | | | |
|---|---|---|---|
| USD | 603,81 | -1,9% | ↓ |
| JPY | 5,39 | -1,4% | ↓ |
| GBP | 1.074,35 | -0,7% | ↓ |
| NOK | 94,41 | -0,4% | ↓ |

**Íløgufeløg**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 103,93 | -0,4% | ↓ |
| Evru Lánsbrøv | 174,85 | -0,4% | ↓ |
| Norrøn Partabrøv | 98,55 | 0,9% | ↑ |
| Altjóða Vøkstur | 65,92 | -1,9% | ↓ |

*Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan. Myndirnar vísa gongdina seinastu 3 mánaðirnar.*

*Greiningin er grundað á keldur, sum Kaupthing metir vera álítandi, men Kaupthing hevur ikki ábyrgd av, at tilfarið altíð er neyvt og nágreiniligt. Kaupthing kann heldur ikki ábyrgdast tapi ella líknandi, sum stendst av gerðum, ið hava støði í greiningunum í hesum tilfari.*


# Minningargrunnur

## Dánjal Niclasen's

Við hesum verður sagt frá, at umsóknir fyri 2005 um stuðul úr Minningargrunni Dánjal Niclasen's eiga at verða okkum í hendi í seinasta lagi mikudagin, hin 10. august 2005.

Umsóknarblað fæst við at fara á heimasíðuna www.faroe.com ella heimasíðuna www.united.fo ella seta seg í samband við Faroe Seafood, tel. nr. 35 55 55. Umsóknarblaðið skal sendast til nevndina í Minningargrunni Dánjal Niclasen:

**Minningargrunnur Dánjal Niclasen's**
**c/o Faroe Seafood**
**Postboks 68**
**FO-100 Tórshavn**
**Att.: Meinhard Jacobsen, nevndarformaður**

*Endamálið við Minningargrunni Dánjal Niclasen er at stuðla ungum føroyingum, ið vilja útvega sær **víðari útbúgving** innanfyri føroyska fiskivinnu. Í 2005 verða umsóknir um stuðul úr Minningargrunni Dánjal Niclasen's raðfestar á henda hátt:*

- *Serútbúgving í handils- og fíggjarviðurskiftum, sum hava við fiskivinnu at gera.*
- *Marknaðarkanningar til frama fyri føroyska fiskivinnu.*
- *Víðari útbúgving, ið hevur við viðgerð og góðsking av fiski og fiskavørum at gera.*
- *Kanning av fiskiskapi uttanfyri Føroyar, sum kann bera í sær nýggjar veiðuhættir ella veiðu av fiskasløgum, ið ikki hava verið vanlig í Føroyum.*

Sosialurin 341800





# Skrivstovubygningur á Argjavegi 26, Argir til sølu

Bygningurin er í 3 hæddum á uml. 200 fermetrar hvør. Grundøkið er 689 fermetrar. Bygningurin er innrættur sum skrivstovuhølir í teimum ovastu hæddunum og eitt stórt rúm í niðastu hæddini.

Bygningurin er væl egnaður til nógv ymisk endamál og hevur góð parkeringsviðurskifti.

Bygningurin verður seldur um hóskandi boð fæst.

inni

P/F inni • Niels Finsens Gøta 37
P.O. Box 364 • FO-110 Tórshavn
inni@inni.fo • Tlf. 320 410 • Fax 320 510

Sosialurin 341800